**Býráðsfundur mikudagin 25. juni 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **12/00066**<br>**Umsókn um garðloyvi og um marknaðarbýti millum matr. nr. 99 og matr. nr. m í Syðrugøtu**<br>Í 2012 sendi Jónvá Gregersen og Atli Feilberg Hansen í Syðrugøtu umsókn um garðloyvi og um marknaðarbýti, Jónvá og Atli eiga matr. nr. 99 og Eysturkommuna eigur matr. nr. m ið er almennur vegur.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at Jónvá og Atli fáa loyvi at gera garð og tann samlaða hæddin á garðinum ikki er hægrið enn 1 metur. Somuleiðis skal tann ovasti parturin á garðinum ikki verða massivur, ella úr betongi og innkoyring til stykkið skal verða frá niðaru síðu, t.v.s. inn frá vegnum Húsgarður. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarevndini, og at tekningar av garðinum skulu sendast kommununi til góðkenningar. |
| 2. | **14/00085**<br>**Umsókn um keyp av part av matr. nr. 57ag í Norðragøtu**<br>Heini Heinason hevur sent umsókn um at keypa ein part av amtr. nr. 57ag í Norðragøtu at leggja til matr. nr. 57au ið er ogn hjá Heina. Umsóknin fevnir um áleið 8 m norðureftir, ella uml. 190 m$^2$.<br><br>Á matr. nr. 57ag er í dag bygt ein transfomarastøð og áseting fyri økið er bústaðir – B.<br><br>Tekniska umsiting mælir til at Heini Heinason fær loyvi at keypa uml. 6 metrar av stykkinum, sum er uml. 100 – 120 m$^2$.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at selja av matr. nr. 57ag, grundað á, at ásetingin fyri økið sambært byggisamtyktini er sethúsaøki og at matr. nr. 57ag verður nógv minni, sammett við onnur grundstykki í kommununi.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til taka undir tilmælinum hjá teknisku umsiting. | Oluffa Joensen setti fram broytingaruppskot um at mart. nr. 57 ag verður sett til sølu sum grundstykkið.<br><br>Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Oluffu Joensen og atkvøtt bleiv soleiðis:<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Oluffa Joensen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen.<br><br>**Atkvøður ímóti:**<br>Johan Christiansen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Árni Jacobsen<br><br>Sostatt er uppskoti falli.<br><br>Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis: |

**Býráðsfundur mikudagin 25. juni 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

**Atkvøður fyri:**
Johan Christiansen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Atkvødur ímóti:**
Oluffa Joensen, við tí viðmerking at matr. nr. 57 ag eigur at verða lýst til sølu sum grundstykkið, áðrenn støða verður tikin til umsøknin.

**Atkvødd blankt:**
Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen

Sostatt er samtykt at tak undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

3. **14/00085**
**Umsókn um øki til kampingpláss/summarhús**
Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at gera summarhús/kampingpláss við bátahylin inni á Toftanesi í Leirvík.

Vinnunevndin mælir til at ganga umsóknini á møti, treyta av at talan verður um í minsta lagi 5 hús.

Áðrenn endalig støða verður tikin skulu meir nágreiniligar tekningar fyriliggja og treytir annars avtalast millum kommununa og umsøkjaran.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

4. **14/00042**
**Bingjnupláss.**
Støðutakan til uppskot til bingjupláss í Norðragøtu.

Vinnunevndin mælir til at gera bingjuplássið sambært fyriliggjandi tekning. Mælt verður til arbeiðið verður gjørt í ár, men at húsið verður gjørt í 2015.

Verandi játtan røkkur ikki til arbeiði, og tí mælir vinnunevndin til at veita eykajáttan á 500 t.kr.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mikudagin 25. juni 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

5. **14/00283**

**Eysturleiðin í summarfrítíðini**

AP-bussar hava sent fyrispurning um Eysturleiðin skal koyra í summarfrítíðini. Higartil hevur tað verið soleiðis, at Eysturleiðin hevur ikki koyrt í summarfrítíðini og jólafrítíðini. Á fíggjarætlanini er peninguri ikki avsettur til hetta, so um Eysturleiðin skal koyra í summarfrítíðini, má roknast við at neyðugt verður við eykajáttan seinni í ár.

Vinnunevndin mælir til at Eysturleiðin koyrir í summarfrítíðini sambært fyriliggjandi uppskoti nr. 2.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

*Ólavur Olsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

6. **14/002680**

**Góðkenning av roknskapi hjá Kongshavnar havn**

Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

7. **14/00246**

**2. viðgerð av eykajáttan til barnaverndartænastuna**

Við 1. viðgerð bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 470.000,00, og at peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

8. **13/00529**

**Yvirtøka av eldraøkinum**

Einmælt samtykt at taka undir við

**Býráðsfundur mikudagin 25. juni 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

Støðutakan til fyriliggjandi sáttmála.

Trivnaðarnevndin mælir til at samtykkja fyriliggjandi sáttmála, og at Oluffa Joensen og Emma Rasmussen, saman við borgarstjóranum, verða partur av stýrinum. Trivnaðarnevndin mælir eisini til at leiðari verður settur sum skjotast fyri samstarvið.

Fíggjarnevndin tekur støðu til máli á býráðsfundinum.

tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

9. **14/00305**
**Eykajáttan til ventilatiónsskipan í Gjáa**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 500.000,00. Peningurin veður tikin av innistandandi.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Atkvøður fyri:**
Johan Christiansen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen

**Atkvødurblankt**
Oluffa Joensen,

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

**Býráðsfundur mikudagin 25. juni 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.00**